# SetHúsaSølan

Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgreiðslutíð: 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 14 - 17 tel 320252

NÝTT



**Trøð í Bø**
Matr. nr. 3, stór 13.500 $m^2$.
Trøðin liggur uttanfyri bygdina ávegis til Gásadals, sera vakurt útsýni.
**Verður seld, um nøktandi boð verður givið!**

NÝTT



**Sethús í Sørvági**
Matr. nr. 231g og231d, íalt 690 $m^2$.
Húsini eru timburhús í 2 hæddum, hvør hæddin $90m^2$
Á stovuhæddini er durur, gong, køkur, stova, baðirúm 4 kømur og hjallur. Kjallarin óinnrættaður. Til húsini hoyra eitt $15m^2$ úthús.
Húsini eru upprunalig bygd í 1964 men fleiri umvælingar eru gjørdar. Køkur og vindeygu eru skift 1985/86, tekja og úthurð er er skift 2003
Húsini liggja væl fyri við góðum útsýni.
**Verða seld um nøktandi boð verður givið!**

NÝTT



**Sethús í Miðvági**
matr. nr.336, grundøki 762 $m^2$.
Húsini eru frá 1969, stoypt og klødd við timbur í 3 hæddum, íalt umleið 295 $m^2$.
Í Kjallaranum: durur, gong, 1 kamar, vaskirúm og kjallararúm.
Á stovuhæddini: durur,gong brúsa/wc, kamar, køkur, spísi- og sitistova í einum.
Á loftshæddini: gong og 3 kømur.
Í 1989 eru húsini kløddi við timbur og miðhæddin umvæld av nýggjum. Tætt tróður og nýtt tak, nýggjur oljutangi og brennari, nýggjur durur í kjallaranum.
**Verða seld um nøktandi boð verða givið!**



**Tórshavn: Eigaraíbúð nr. 36 Berjabrekka 159**
*Matr.nr. 1464c, grundøki 100,4 $m^2$*
Íbúðin er bygd síðst í 80-arunum, er í 2 hæddum, stovu- og loftshædd íalt uml. 89 $m^2$ + úthús $9m^2$.
Á stovuhæddini er: Durur, køkur, borð- og sitistova.
Á Loftshæddini er: Gong hjúnarrúm, kamar, baðirúm.
Frá stovuhæddini er góð terassa.
Úthúsið er væl inrættað til grovkøk og vaskirúm, flísar á gólvinum
**Íbúðin verður seld, um nøktandi boð fæst**



**Hoyvík: Tvíhús Onnugøta 10b**
*matr. nr. 1hq, grundøki 300 $m^2$*
Húsini, ið eru bygd síðst í 80-árunum, eru í 2 hæddum, stovu- og loftshædd íalt uml. $118m^2$ + bilhús $50m^2$.
Á stovuhæddini er: Gong, køkur og stova, wc og kamar.
Á loftshæddini er: Hjúnarrúm, 2 kømur, WC við brúsu.
Húsini hava altan frá loftshæddini eins og tað er stór terassa frá stovuhæddini.
Bilhúsið er leyst frá húsunum, og innrættað við skrivstovu, wc og brúsu. Gólvið er lagt við klinkum.
**Húsini verða seld um nøktandi boð fæst!**



**Tórshavn: Sethús Oman Mattalág 6**
*Matr. nr. 899p, grundøki 322 $m^2$*
Húsini, ið upprunaliga eru bygd í 60 árunum, eru í 3 hæddum, íalt umleið 240 $m^2$. Stoypt grund, stovu- og loftshæddin timbur, klødd við plastbrettum í 70 árunum og bjálvaði. Eternittak. Termorútar í stovu- og loftshæddini. Í stovuhæddini er gong, WC, kamar, køkur og 2 stovur. Á loftshæddini er gong, baðirúm, hjúnarúm við altan og 2 kømur. Í kjallarahæddini er ítrivsrúm, hjallur og stórt kjallararúm. Húsini eru vælhildin og hava gott útsýni frá loftshæddini!
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið!**



**Tórshavn: sethús Dj. Í Geilsgøta 59**
*Matr.nr. 706s, grundøki 446 $m^2$*
Húsini, ið eru bygd siðst í 60-árunum, eru í 3 hæddum, stovu- og kjallarahædd íalt uml 240m2 + loft. Í kjallarahæddini er garaga og sjálvstøðug íbúð: durur, gong, wc, brúsa, kjallari, køkur, goymslurúm, stova og 2 kømur. Á stovuhæddini er durur, gong, baðirúm, køkur, arbeiðsrúm, stova, 3 kømur og hjallur. Loftið óinnrættað. Húsini eru umvæld í 90-unum: tak, oljufýr, vindeygu v.m.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið!**

Sosialurin 341800


Heimarøktin
og Serforsorgin
*eginskrivstovan*

# Leiðari til Serstovnadeildina

Starvið sum leiðari fyri Serstovnadeildina, verður hervið lýst leyst til setan 1. oktober 2004.

Serstovnadeildin er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini og fevnir um bústovnar, sambýlir, verkstaðs- og virknistilboð v.m. innan serstovnaøkið. Serstovnadeildin hevur sítt virksemi kring alt landið.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum.

Leiðarin hevur ábyrgdina av dagligu fyrisitingarligu-, fíggjarligu- og fakligu heildarleiðsluni av deildini og skal standa fyri m.a. hesum høvuðsuppgávum:

- samskipa og menna virksemið á Serstovnadeildini
- røkja ta fyrisitingarligu leiðsluna
- hava eftirlit við og virka fyri, at játtaða fíggjarætlanin verður hildin
- fyriskipa fíggjarlógararbeiðið fyri virksemið hjá Serstovnadeildini í samstarvi við leiðsluna
- reka mennandi starvsfólkapolitikk, herundir fakliga ráðgeving
- seta í starv og siga starvsfólkum úr starvi eftir nærri ásettum reglum
- virka fyri støðugari fakligari menning
- virka fyri góðum samstarvi innanhýsis og við aðrar stovnar og skipanir
- menna samstarv við aðrar fakbólkar, myndugleikar og áhugabólkar

Harumframt skal leiðarin vera við til at koma við hugskotum, fyrireika og fyriskipa víðari menning og útbygging av virkseminum á økinum.

**Førleikakrøv:**
Væntað verður, at umsøkjarin:

- hevur viðkomandi útbúgving og starvsroyndir.
- hevur hollar leiðslu og fyrisitingarligar starvsroyndir
- hevur góð samskiftisevni, herundir góðan málsligan førleika
- evnar at yvirskoða fløktar samanhangir og at taka avgerðir
- er førur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum
- evnar at seta í verk nýggjar fyriskipanir og verkætlanir og at fylgja hesum upp
- dugir væl við fólki
- er framsøkin, áhugaður og hugkveikjandi

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Serstovnadeildin.

Starvið hevur verið tænastumannastarv. Lønin er flokkað á stigi 49 sambært lønartalvuni hjá Føroya Pedagogfelag.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra ella Bjarna Clementsen, leiðara fyri Serstovnadeildina.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktina og Serforsorgina**
Att: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: Týsdagin 17. august 2004**


Sosialurin
Sosialurin
i




# Fuglafjarðar skúli

Hesi størv eru leys at søkja:

• **2 lærarastørv** fyri lærarar í farloyvi

**Starv 1:**
5 t fø. í 9. fl.
4 t ge. ítr. í 4. og 9. fl.
8 t heimk. í 8. og 10. fl.
2 t hand. í 9. fl.
2 t vakt í svimj.
+ starvspraktikk ella annað

**Starv 2:**
5 t fø í 9. fl.
6 t stødd. í 4. fl
2 t samtíð í 10. fl.
7 t serundirvísing

Starv 1 er tíðaravmarkað fyri skúlaárið 2004/2005, meðan starv 2 er tíðaravmarkað frá 1. august til 8. oktober 2004.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 448400 ella 214087.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 2. august kl. 10.00.**

**Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!**

**Fuglafjarðar skúlastýri**
**v/ Una Næs**
**FO-530 Fuglafjørður**

# Frá Hvalvíkar skúla

Vegna avlopstímar søkir Hvalvíkar skúli eftir eitt um lærara í tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2004/2005. Starvið er fulla tíð.

Løn sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Í Hvalvíkar skúla skúlaárið 2004-2005 verða 49 næmingar og 5 lærarar harav tú verður ein teirra.

Umsóknir við viðkomandi prógvum skulu í seinasta lagi 5. august sendast til:

**Skúlastýrið í Hvalvíkar skúla**
v/ Aslaug Olsen
645 Æðuvík


# Eysturoyingar

**Eysturoyar Teoriskúli**

**Nýtt teoriskeið byrjar mánakvøldið 26. juli kl.19.00 á Glyvrum**



**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel 225225**
**Ole Lykke, tel 220972**

Sosialurin 341800


# Stuðlar til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktar-uppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir stuðlar, ið m.a.:

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intutión
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- eru sterkir - bæði til sálar og likam
- kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Størvini verða sett skjótast gjørligt. Søkt verður eftir stuðul til:

**Sandavágur:**

Kvinna við ALS - Vøddasvinn.
Talan er um 31 tímar um vikuna, við skiftandi vaktum. At byrja 01.08.04 ella skjótast gjørligt eftir hetta. Freistin at søkja er 30. juli. 2004.

**Sørvágur/Sandavágur:**

Talan er um stuðul til 3 brúkarar við ymiskum brekum, umleið 30 tímar um vikuna. Møguleiki er at deila tímarnar. At byrja skjótast gjørligt.

**Tórshavn:**

Fjølbrekaður ungur maður
Talan er um 39 tímar um vikuna, arbeiðstíðirnar eru seinnapart, kvøld og 1 nátt um vikuna. At byrja 1.sept. Freistin at søkja er 1. august.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita hjá serráðgeva, Odu Johansdóttir, tlf: 354024 ella pædagogiskum ráðgeva, Sofía Jespersen, tlf. 354025.

Umsóknir skulu sendast til:

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin**
Att.: Oda Johansdóttir
Niels Finsensgøtu 28, 2. hædd, Fo -100 Tórshavn,
Tlf: 354020 - Telefax 354021



**Runavíkar kommuna søkir eftir**

# Starvsfólki

**til heim fyri minnisveik fólk**

Søkt verður eftir: - sjúkrarøktarfrøðingum
- heilsurøktarum
- heilsuhjálparum

Miðað verður eftir at heimið letur upp í septemb-er 2004.

Á heiminum er pláss fyri 8 minnisveikum fólkum. Umstøðurnar á heiminum eru góðar og væl egnaðar til fólk ið eru minnisveik. Harumframt liggur heimið í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn.

Endamálið við heiminum er at geva minnisveikum fólki, við serligum tørvi á umsorgan, eina trygga og stimbrandi tilveru. Vit ynskja starvsfólk sum hevur áhuga og hegni til at vera um minnisveik fólk. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjarnar:**
- hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur, almanna- og heilsuatstøðingur ella heilsuhjálpari
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkinum
- er nýhugsandi og hevur hug og árræði at skipa fyri dagligum virksemi fyri tey minnisveiku

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at
- menna umsorgan og røkt
- Góða innleiðslu
- Undirvísing
- Góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni

**Eisini verður søkt eftir**
- fólki til køkin
- fólki til reingerð

Um ikki nóg nógvir skikkaðir umsøkjarar søkja, verða hjálparfólk sett.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið ella Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Maibritt Jacobsen, leiðara á tlf. 448034 ella 509534

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:
**Runavíkar Kommuna**
Att. Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðari
Heiðavegur 26, Postboks 139
FO-600 Saltangará

**Umsóknarfreist:** Mánadagin 9. august 2004 kl. 12.00